## Viðmerkingar:

# Ríkisborgararættur og útbúgvingarmøguleikar uttanlands

Í samband við samráðingarnar millum Landsstýrið og donsku stjørnina hava mong ivamál tikið seg upp um viðurskifti, ið føroyingar higartil ikki hava givið sær so nógv fær um. Millum hesi ivamál er m.a. spurningurin um hvørji rættindi føroyingar kunnu rokna við at vaðveita, um samráðingar Landsstýrisins enda við at Føroyar gerst fullveldi við føroyskum ríkisborgararætti.

Lat meg sláa fast beinanvegin, at ríkisfelagsskapurin, sum er, á mongum økjum ikki er nøkur foran fyri okkara avgerðarmøguleikum, hvørki hjá føroyskum myndugleikum ella einstaklingum. Hjá t.d. føroyingum, ið ætlað sær undir útbúgving í øðrum londum enn í Danmark, er danski ríkisborgararætturin, ein avgerandi fyrimunur. Danskir útbúgvingarmynduleikar heita á og vegleiða síni lesandi um nettup at fara út í heimin at nema sær kunnleika, tí Danmark eisini er eitt lítið land, ið tørvar íblástur og kunnleika uttanífrá. Ríkisfelagsskapurin tryggjar okkum í dag somu møguleikar og sømdir sum donskum lesandi, tí vit kunnu fara runt jarðarknøttin at lesa við donskum lestrarstuðli. Okkum nýtist enntá ikki at seta fótin á danska jørð um hetta bíður onkrum ímóti

Ein avgerandi spurningur fyri okkara menningarmøguleikar sum tjóð, eru útbúgvingamøguleikarnir framyvir. Hesi viðurskifti eru hvørki lýst nøktandi í Hvítubók ella í Útbúgvingarálitinum. Umfatandi tilknýti og samskifti okkara við danskar útbúgvingarstovnar og mynduleikar er slett ikki lýst yvirhøvur, og innlitið hjá okkara landsstýri og samráðingarfólki er hareftir.

**Føroyski stuðulin fæst bert í 11 mánaðir**

Høgni Hoydal sigur í svari uppá fyrispurning frá Heðini Mortensen, at støðan hjá okkara lesandi verður óbroytt í mun til í dag, um danir góðtaka at geva okkum somu skipan sum íslendingar, tí norðurlendskur sáttmáli tryggjar norðurlendingum javnbjóðis atgongd til lærustovnarnir hjá hvørjum øðrum.

Høgni Hoydal eigur at seta seg inn í veruleikan, áðrenn hann staðfestir at støðan hjá okkara lesandi verður óbroytt í mun til í dag og at norðurlendskur sáttmáli tryggjar okkum javnbjóðis rættindi. Veruleikin er at norðurlendskur sáttmáli vil smalka tað nálareyga, ið føroyingar skulu ígjøgnum, tá søkt verður um upptøku á lærustovni í Danmark, og norðurlendskur sáttmáli er ikki ætlaður til, at tey flestu lesandi úr einum norðurlandi lesa í øðrum norðurlandi. Hetta vil eg venda aftur til í seinni blaðgrein.

Viðvíkjandi lestrarstuðlinum, sigur Høgni Hoydal í svarinum, at landsstýrið miðar eftir, at føroyskur lestrarstuðul verður veittur til tey, sum lesa í hinum norðanlondum eins og uttan fyri norðurlond, og at stuðulin verður fult so nøktandi sum í dag. Hann átti at skoytt uppí at føroyski stuðulin er minni enn tann danski og at føroyski stuðulin bert fæst í 11 mðr. Hvat føroysk lesandi skulu liva av tann 12. mðr., átti hann eisini at havt boð uppá.

Svar hansara, at norðurlendsk lesandi hava javnbjóðis rættindi at lesa hjá hvørjum øðrum, er ikki allur sannleikin. Tá Høgni Hoydal tosar um útbúgvingarmøguleikar, tosar hann altíð um hægri útbúgvingar (aftaná miðnámsprógv) og gloymir tær mongu útbúgvingarnar, føroyingar hava møguleika til at nema sær í Danmark, um hesar ikki krevja miðnámsprógv frammanundan.

**Ríkisborgararætturin er atgongumerkið**

Fyri at fleiri kunnu hava møguleikan at lesa, er neyðugt hjá teimum at hava atgongd til nøktandi sosialar vælferðarskipanir, ið vit ikki hava sjálvi, men sum hesi, við verandi ríkisborgararætti, fáa atgongd til beinanvegin tey flyta í danskar kommunur.

Landsstýrið hevur neyvan givið sær far um, hvørjar avleiðingar tað fær fyri vitan og útbúgvingarstøði okkara, um útbúgvingarmøguleikarnir í framtíðini verða skerdir. Sjálvt okkara egnu útbúgvingarstovnar hava ikki nøktandi umstøður sum er.

Ein avgerandi spurningur, sum vit eiga at stilla okkum, er um føroyskur ríkisborgarætur kann fáa avleiðingar fyri lestraregnaðir føroyingar, um hesir skulu dúva uppá okkara egnu útbúgvingarstuðulsskipan, lestrarmøguleikar í Føroyum og aðrar útbúgvingarmøguleikar undir øðrum skipanum sum t.d. ALS og endurbúgving eftir forsorgarlógini.

Svarið er heilt greitt, at vit hava nakrar møguleikar í ríkisfelagsskapinum, sum vit missa við egnum ríkisborgarrætti. Serliga er stórur vandi fyri, at tey, sum onga útbúgving fingu sum ung og onnur sum ikki hava trivist í vanligu skúlaskipanini, fáa verri møguleikar enn í dag.

Hesi finnast í dag í stórum talið í donskum útbúgvingarskipanum, og hjá hesum er atgongumerkið danski ríkisborgararætturin.

Sum dømi kann nevnast, at treytin fyri at útbúgva seg til sosial og sunnheitshjálpara og assistent í Danmark, er at hvør einstakur lesandi hevur útbúgvingaravtalu við danska kommunu, ið rindar viðkomandi løn undir útbúgvingini. Lønin í lestrartíðini er gott 7.000,- um mðr. og harumframt hava føroyingar í lestrarørindum í Danmark, rætt til føroyafrádrátt uppá 55.000,-kr. um árið, sum í prinsippinum merkir, at lestrarlønin gerst skattafrí. Henda møguleika, sum er fyritreytin hjá mongum, hava aðrir norðurlendingar ikki.



**Ongar vælferðarskipanir vóru í 1918**

Eg kundi nevnt aðrar útbúgvingarmøguleikar, sum nógvir føroyingar hava gjørt nýtslu av gjøgnum atgongd til danskar A-kassar og møguleikar hjá ungfólki ígjøgnum t.d. „Den Fri Ungdomsuddannelse", ið er ætlað ungum, ið ikki hava trivist í vanligu skúlaskipanini. Somuleiðis fara fleiri og fleiri av okkara ungu 1 ár á danskar eftirskúlar, har hesi fáa bæði danskan stats og kommunustuðul.

Tað tykist ikki sum Høgni Hoydal er vitandi um hesar føroyingar, tá hann svarar sum hann ger, at støðan hjá lesandi føroyingum í Danmark verður óbroytt í mun til í dag, um bert vit fáa somu avtalu sum onnur Norðurlond. Tað er heldur ikki álitisvekjandi at fyrireikingar og kunningararbeiði hjá samgonguni er so ússaligt og lítið sannførandi, tá tað snýr seg um útbúgvingarviðurskifti hjá øllum føroyingum.

Vónandi koma vit ikki at uppliva tað tíð aftur, at bert tey vælbjargaðu, tey, ið hava pening og vald, koma at hava ráð at nema sær kunnleika. Føroyafrádrátturin ger tað møguligt hjá nógvum vaksnum føroyingum at fáa sær útbúgving í Danmark í dag.

At føroyingar í samráðingunum við danir royna at vísa á avtaluna, ið íslendingar og danir gjørdu í 1918, kann ikki nýtast til nakað, tí tá vóru ongar vælferðarskipanir ella rættindi hjá vanligum fólki til t.d.at nema sær útbúgving.

**Kristian Magnussen**
**løgtingsmaður**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**

# Fleiri spurningar frá tiltakinum Hesuferð

Vit fara at loyva okkum at seta nakrar spurningar aftrat í sambandi við gongdina í fullveldismálinum.

Spurningur til Miðflokkin: Flokkurin førir fram, at landsstýrið hevur gjørt ein stóran feil við at hava yvirskot á fíggjarlógini, tí so taka danir blokkstuðulin frá okkum. Sagt verður eisini, at yvirskotið á fíggjarlógini er orsøk til, at danir geva føroyingum so stutta skiftistíð.

Merkir hetta, at Miðflokkurin leggur dent á, at vit altíð nýta allan peningin úr Danmark og yvirskotið á fíggjarlógini beinanvegin, fyri at prógva fyri dønum, at vit hava tørv á stórari ríkisveiting?

Spurningur til Javnaðarflokkin: Formaður floksins er vorðin skuldsettur fyri, at tað er hann, sum saman við Poul Nyrup leggur til rættis donsku samráðingarætlanina. At tað er hann, sum tryggjar at stjórnin setur landsstýrinum so harðar treytir, at tað verður ringt at vinna eina fólkaatkvøðu um fullveldi.

Skuldsetingarnar byggja á orð, sum Poul Nyrup Rasmussen segði á landsfundi hjá danska Javnaðarflokkinum, tá hann beyð formanninum í føroyska Javnaðarflokkinum vælkomnum_.*I skal vide her på kongressen alle sammen, at vi er i tæt kontakt med hinanden. At vi gør fra hver vores position alt for at hjælpe hinanden med at finde de fremtidsløsninger på det færøske samfunds forbindelser til det danske, som er så afgørende for os alle sammen_.*

Hevur Javnaðarflokkurin nakrar viðmerkingar til hesar skuldsetingar?

Spurningur til samgonguflokkarnir:. Tosað verður nú um at skjóta út ígildissetingina av sáttmálanum við Danmark. Hvat merkir hetta, og hvørjar grundgevingar eru fyri hesum?

**Fyri Hesuferð**
**Vár í Ólavsstovu**










# Hava lænt sjúkrabil úr Fuglafirði

*Trupulleikin við sjúkrabilunum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er so stórur, at klaksvíkingar hava lænt ein sjúkrabil frá sløkkiliðnum í Fuglafirði*

Eyðun Klakkstein

Klaksvíkar Sjúkrahús fekk fríggjadagin ein sjúkrabil hjá sløkkiliðnum í Fuglafirði til láns í 10 dagar.

Støðan við sjúkrabilunum í Klaksvík er so vánalig, at neyðugt var at biðja fuglfirðingar um eina hjálpandi hond, nú annar av sjúkrabilunum í Klaksvík stendur við brotnum aksli og hin er í ringum standi.

Undir neyðsendarkoyring fyri eini viku síðani, breyt annar sjúkrabilurin í Klaksvík ein drívaksil. Hin bilurin var tá á verkstaði, tí hann hevur fingið so nógvar krossar eftir sýn. Hesin bilurin virkar í dag sum sjúkrabilur, men um hann ikki verður gjørdur í stand fyrsta dagin, verður hann settur.



*Klaksvíkingar hava nú lænt ein sjúkrabil í staðin fyri hendan, sum verður sleipaður á verkstað*

**Fáa nýggjan bil**

Jens Jacobsen, yvirportørur á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sigur, at teir ætla at gera hendan sjúkrabilin í stand so skjótt sum gjørligt. Harafturat verður eisini sjúkrabilurin, sum breyt aksilin, gjørdur í stand, tá lutir koma úr útlandinum.

Síðst í hesum mánaðinum fær Klaksvíkar Sjúkrahús ein spildurnýggjan VW-sjúkrabil úr Íslandi, og tá hesin bilurin er komin til Klaksvíkar, hevur Klaksvíkar Sjúkrahús tríggjar sjúkrabilar – ein nýggjan og tveir gamlar.

Í síðstu viku var ein Mazda-vøruvognum so at siga einasta álitið hjá sjúkraflutningnum í Klaksvík.

# Sandoyggin fær kunningarstovu

*Sandoyingar hava stovnað felag, sum skal seta ferð á ferðavinnuna í Sandoynni*

Dánjal Højgaard

Sandoyggin verður nú av álvara sett á ferðakortið.

Herfyri varð felagið Sandoyar Sýslu Ferðalag sett á stovn, og vórðu fimm fólk vald í nevndina fyri felagið.

Ætlanin er, at felagið skal fáa í lag skipaðar karmar fyri ferðavinnuna í Sandoynni. Tað skal verða meira áhugavert at vitja Sandoynna, samstundis sum ferðavinnan skal geva fleiri krónur í kassan hjá sandoyingum.

Virkast skal fyri góðum gistingarmøguleikum og møguleikum at fáa sær ein matarbita í Sandoynni. Eisini skal arbeiðast fyri góðum útferðarmøguleikum.

Ein liður í arbeiðnum er at seta á stovn eina kunningarstovu í Sandoynni. Eitt fólk er sett at røkja hesa uppgávu nakrar tímar um dagin í summar, og arbeitt verður við at finna høli til kunningarstovuna.

# Ókeypis dekk kanningar á Super Dekk

Magnsus Gunnarsson

Í Danmark var í sjeytiárunum vanligt við ókeypis dekk kanningum, »Dæk under lup«, sum tær kallaðust, har fólk komu við bilinum og fingu kannað dekktrýst, mynsturdýpd,og um sporingin var í lagi.

**Kanningarnar væl móttiknar**

At Super Dekk nú aftur lýsir við ókeypis dekk kanningum er ikki nakað nýtt. Í 1977 og 78 høvdu teir eisini ókeypis dekk kanningar. Tað var tá Super Dekk Service helt til í Jekaragøtu, har sum Fragd & Fimi er nú. Fakfólk komu úr Danmark at hjálpa til við hesum kanningum, og vóru tær eisini gjørdar á bilverkstøðum í Klaksvík, í Runavík, á Tvøroyri og í Miðvági. Hesar kanningar vóru væl móttiknar og nógv fólk komu at fáa dekkini kannaði.

**Kanna dekkini áðrenn løgreglan ger tað**

Nú eru teir á Super Dekk aftur farnir undir eitt líknandi átak. Tað sum er eftir av hesi vikuni og alla næstu viku verða ókeypis dekk kanningar á Super Dekk, undir lýsingartiltakinum »Latið okkum kanna dekkini, áðrenn løgreglan ger tað«.



*Fríðrik Bláhamar, stjóri á Super Dekk, kann dekkið*

Tey, sum koma við bilinum til hesar kanningar, fáa at vita, hvat lufttrýstið er í dekkunum, og hvussu nógv dekkini eru slitin. Lógin sigur, at tað skal vera minst 1.6 mm eftir av dekkmynstrinum. Kannað verður, um dekkini eru skeivt slitin, og kundin fær holla ráðgeving og eitt gott óbindandi tilboð uppá tað sum skal gerast við bilin, sigur Fríðrik Bláhamar frá Super Dekk.

**Lutakast um fýra Goodyear dekk**

Ókeypis dekk kanningarnar enda leygardagin 27. mai við einum tiltaki á Super Dekk, har møguleiki verður fyri at lyfta einum stórum dekki, sum vigar umleið 300 kg.

Dekkið liggur niðri, og tann sum fær tað upp at standa, er við í einum lutakasti um at vinna fýra Goodyear persónbiladekk. Hetta er roynt fyrr á onkrari sølustevnu, har t.d. Regin Vágadal var við.

Tað hevur stóran týdning at fáa hjólini kannað, tí um lufttrýstið í dekkunum er ov lágt ella ov høgt, halda dekkini ikki tað tey eru gjørd til at klára. Eitt dekk, sum koyrir leingi við alt ov lítlari luft, er í stórum vanda fyri at bresta, tí tað verður ovurupphitað. Fyri tey sum ætla sær uttanlands at koyra, er gott at sleppa undan slíkum óneyðugum trupulleikum á túrinum.


